## Situr framvegis

**Maðurin, sum fyrst í mai mánað, stakk Finn Ougaard, varafúta í lærið, situr framvegis í varðhaldinum**

Randi Jacobsen

Í grundlógarhoyri 5. mai varð ein maður varðhaldsfongslaður í fýra vikur, tí hann dagin fyri stakk varafútan í lærið.

Síðan er varðhaldsfongslingin longd við fýra vikum hvørja ferð. Tann seinasta skuldi gingið út ólavsøkuaftan.

Tað liggur ikki so væl fyri at hava rættarfund ólavsøkuaftan, og tí varð rættarfundurin framskundaður til mikudagin í hesi vikuni við góðkenning frá tí varðhaldsfongslaða manninum.

Hesa ferð gongur varðhaldsfongslingin út 18. august.

Í grundlógarhoyrinum í mai varð avgjørt, at maðurin skuldi mentalkannast. Kanningin er gjørd, men ikki rættiliga liður enn.

Ein danskur dómari skal døma, tá ið málið kemur fyri í rættinum.

## Marelkvotan verður 85.000 tons

Tað eydnaðist ikki landsstýrinum at tryggja føroyingum størri makrelkvotu í samráðinum, og í gjár gjørdi Jacob Vestergaard av, at føroyingar áseta sær sína egnu kvotu.

Við Kringvarpið sigur hann, at kvotan verður 85.000 tons í ár.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann hevur partvíst undirtøku fyri at áseta Føroyum egna makrelkvotu.

- Fólk eru sjálvandi ymisk á máli, men eg havi so partvísa undirtøku fyri at útskriva eginkvotuna á 85.000 tons av makreli, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum.

# SKILIR IKKI ATFINNINGARNAR

**- Tað ljóðar sum ein nýliga íkomin trupulleiki, men grótkastið, sum nú fær skyldina fyri at grindadrápið ikki gekk, sum tað burdi, hevur ligið har síðani miðskeiðis í 80-unum, sigur Gunvá við Keldu, borgarstjóri**



*Gunvá við Keldu hevur ilt við at skilja kritikkin av Klaksvík sum hvalvág*

Leo Poulsen

Nógv kjak hevur staðist av drápinum í Klaksvík fyrst í vikuni, og funnist hevur verið at, at drápið bæði gekk seint og var ljótt. Fleiri røddir hava tó vent kritikkinum aftur, og eisini Gunvá við Keldu, borgarstjóri, stendur heldur spyrjandi mótvegis áganginum.

- Tað gerst altíð trupult, tá grindin verður ov stór. Tað eru fáar hvalvágir, ið lættliga taka ímóti 300 hval, og tá grindin gerst so stór, so hava vit eisini trupulleikar her í Klaksvík, sigur Gunvá við Keldu.

Hon sigur, at sjálvandi tekur tað longri tíð at halda einari størri grind til, men tað, sum eisini var óheppi í hesum førinum var, at hon gjørdi landgongd norðari enn ynskiligt var.

Borðoyavík hevur verið nevnd sum hvalvág, men Fiskimálaráðið hevur eftir tilmæli frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni noktað fyri at góðkenna Borðoyavík.

- Eg eri ikki heilt greið yvir, hví so er, men eg haldi at tað er nakað við kloakkviðurskiftunum, og so skulu aðrar ábøtur gerast eisini, tí Borðoyavík er ikki líka náttúrlig hvalvág, sum Klaksvík er frá Skaparans hond, sigur Gunvá við Keldu.

Nógva umrøðan av grindadrápinum hevur so fingið borgarstjóran at tikið stig til ein kjak við millum sýslumann, grindaformenn og býráðið, har viðurskiftini skulu umrøðast.

- Nú hevur býráðið ikki veirð saman, síðani grindin var, men eg havi tosað við avvarandi partar, og semja er um at seta okkum niður, tá heystið byrjar at tosa um, hvussu viðurskiftini at drepa grind í Klaksvík kunnu betrast, sigur Gunvá við Keldu.

### Slakt ongantíð tespiligt

Borgarstjórin sigur, at enn er ov tíðlig at siga nakað um, hvørt ein broyting av sjálvari vágni kemur upp á tal. Fyrst skal málið vendast og snarast, áðrenn støða verður tikin til tað.

- Tað ber illa til at siga nakað um tað nú, men við einum býi í menning kann knapliga gerast neyðugt at gera broytingar, sigur Gunvá við Keldu.

Hon sigur, at tey eisini í býráðshøpi fara at taka málið upp um, hvussu Klaksvík í framtíðini skal verða sum hvalvág.

- Tað ber illa til at spáa um framtíðina, og altjóða trýstið er stórt at steðga okkum at drepa grind, men eg meini, at vit eiga at kunna greiða fólki frá, at hetta er ein partur av okkara mentan. Eisini skulu vit verða betri til at vísa á bæði tað sosiala í at drepa grind og ikki minst, at alt kemur til høldar, og tað hevur framvegis stóran týdning, kanska ikki minst í dag, har ikki øll hava líka nógv at rutta við, sigur Gunvá við Keldu.

Hon skilir tó atfinningar um grindadráp, tá fólk síggja myndir, sum eitt nú sjónvarpið vísti av grindadrápinum í Klaksvík.

- Jú, tað skilji eg. Alt slakt er ótespiligt, og tú sleppur heldur ikki inn á slaktaríir í til dømis Danmark. Tað ger eisini nakað við fólk, tá vit síggja tað á einum skíggja, og tí haldi eg eisini tað er hugstoytt, at sjónvarpið vísir langar seskvensir av einum grindadrápi, tí tað er ikki gott fyri nakran at síggja, sigur Gunvá við Keldu.

leo@sosialurin.fo